# Klárt til innandura FM í fótbólti

**Fríggjamorgunin var drigið um, hvussu spælast skal í innleiðandi bólkunum í innandura FM í fótbólti, sum verður í Hoyvíkshøllini leygardagin. Kappingin hevur fingið navnið Centum Cup í sambandi við, at høvuðsstuðulin, Føroya Banki, í ár fyllir 100 ár.**

INNANDURA FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji Nielsen*

Lutakastið fór fram í Miðlahúsinum í Vágsbotni, og tað var stigtakarin til kappingina, Jákup á Borg, sum stóð fyri lutakastinum.

**Breið umboðan**

Ikki færri enn 14 feløg hava boðað frá luttøku í kappingini, sum tískil verður skipað við fýra innleiðandi bólkum, og úr hvørjum bólki spæla tvey lið seg víðari í eitt millumfar, og síðani verður farið til hálvfinalur og finalu.

Yvirlit yvir bólkarnar sæst aðrastaðnis á síðuni, og tað sær ikki sørt spennandi út. Hóast stórur munur er á innandura og uttandura fótbólti, so fara eitt nú SÍ, AB og FS Vágar 2004 ivaleyst at hava tað eitt sindur trupult móti teimum størru liðunum úr fremstu deildini. Men sum áðurnevnt er torført at samanbera uttandura og innandura fótbólt, so rúm er fyri tí óvæntaða.

Jákup á Borg sigur, at hann er sera spentur upp á kappingina. Sjálvur verður hann ikki við á liðnum hjá HB, tí hann hevur nakað at hugsa um í sambandi við, at hann stendur fyri kappingini. Hann dylur tó ikki fyri, at hann gott kundi hugsað sær at verið við, men tað verður vónandi komandi ár.

- Eg ætli mær so ikki, at hetta skal verða nakað upplop. Vónandi verður kappingin eitt afturvendandi tiltak, sum seinni kanska eisini kann gerast eitt alment FM í innandura fótbólti við góðkenning frá Fótbóltssambandinum, sigur Jákup á Borg.

Tað er Føroya Banki, sum er høvuðsstuðul hjá kappingini, og bankin letur ein gávukekk til vinnandi felagið. Peningurin, ið verður latin, skal brúkast til ungdómsarbeiði í vinnandi felagnum. Umframt Føroya Banka hava eisini Føroya Bjór og 3'arin stuðlað kappingini.


*Tað er landsliðsleikarin Jákup á Borg, sum skipar fyri FM í innandura fótbólti leygardagin.*
*savnsmynd*

**FAKTA**

Centum Cup:

Bólkarnir:

Bólkur 1: KÍ, SÍ, HB og TB
Bólkur 2: ÍF, AB, B36 og NSÍ
Bólkur 3: Skála, EB/Streymur og FS Vágar 2004
Bólkur 4: B68, GÍ og B71

Bólkur 3 og 4 spæla dupultumfar, t.v.s. at liðini spæla móti hvørjum øðrum tvær ferðir. Tvey lið koma víðari úr hvørjum bólki í eitt millumumfar, har tveir kvartfinalubólkar verða leiktir. Síðani fara tvey tey fremstu liðini úr hesum báðum bólkum víðari í hálvfinaluna.

Skrá:

Kl. 12.00 Bólkaspælið byrjar
Kl. 15.15 Kvartfinalubólkar verða spældir
Kl. 17.00 Hálvfinalur
Kl. 17.30 Dystur um 3. plássið
Kl. 17.45 Finala

## Tryggir sigrar

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Miku- og hóskvøldið spældu menninir hjá Nøvuni tveir dystir í bestu mansdeildini í flogbólti. Nøvan er í ár í eini lærupro-sess at kalla, og við dystum móti teimum báðum fremstu liðunum í deildini var ikki stórt, sum nýggja liðið í deildini kundi gera.

Úrslitið bæði kvøldini varð eisini ein tryggur 3-0 sigur til ovaru liðini, sum soleiðis hildu fast um kósina, sum einamest líkist eini kapprenning móti FM-heitinum.

## Fótbóltssunnudagur á Cippo

Undir slagorðinum, Triði heimsbardagi, ætlar Cippo í Havn veruliga at seta fokus á stórdystin í Onglandi sunnudagin.

Á Old Trafford tekur Manchester United ímóti Liverpool, og hetta má nærum metast sum stórdysturin yvir øllum í Onglandi. Eisini hóast tað nú eru Chelsea og Abramovic, sum seta dagsskránna í enskum fótbólti.

Umframt at vísa sjálvan dystin á stórskíggja, verður talan um fleiri aðrar lutir, sum skulu gera dagin til nakað heilt serligt fyri enskar fótbóltsfjepparar. Byrjað verður við enskari buffét longu klokkan 13.30, tá stór sportsquiz við Tróndi Vatnhamar eisini er á skránni. Klokkan 15 sleppa áhugað at tippa um úrslitið, og klokkan 16.00 byrjar so slagið á Old Trafford.




## Nógv vilja verða venjarar

**Áhugin fyri at luttaka í B1 venjaraskeiðnum, sum tað verður farið undir í hesum vikuskiftinum, er so mikið stórur, at teir í FSF hava gjørt av at skipa fyri tveimum skeiðum**

VENJARAÚTBÚGVING
*Jóannes Hansen*

Tað er stórur gravgangur eftir at útbúgva seg til fótbóltsvenjarar. Tað vísir áhugin, sum er fyri B1 venjaraskeiðnum, sum FSF nú fer undir aftur. Upprunaliga var ætlanin hjá FSF at skipa fyri einum skeiði við í mesta lagi 24 luttakarum. Tá ið freistin at boða frá luttøku var úti, høvdu 48 ella tvífalt væntaða hámarks talinum fyri luttøku boðað frá luttøku. Tí hevur FSF gjørt av at skipa fyri tveimum skeiðum.

Upprunaliga varð lýst við skeiði, sum skuldi vera í Gundadali vikuskiftini 20. til 22 januar og 11. og 12. februar. Nú er gjørt av, at sama slag skeið skal haldast somu dagar í Eysturoy. Skeiðið í Eysturoy verður í Leirvík.

Fyri skeiðnum í Eysturoy standa Jóhan Nielsen, Petur Simonsen og Hans Mourits Foldbo. Fyri skeiðnum í Gundadali standa Eli Hentze og Jógvan Martin Olsen.

Í FSF fegnast tey sjálvandi um, at áhugin fyri venjaraútbúgvingunum tykist vera stórur. Tað verður roknað við, at tað serliga eru nýggju minstukrøvini hjá UEFA, sum eru orsøk til, at áhugin júst nú er vorðin so ógvuliga stórur.

B1 útbúgvingin er roknað til 40 tímar. Skeiðið fevnir sambært skeiðlýsingini um at leggja venjingar til rættis, at geva kunnleika um menningina hjá børnum og ungum, við praktiskum royndum at menna førleikan at leiða og standa fyri venjing ella at instruera, um fysisku krøvini í fótbólti, um venjarastarvið og egnan venjaraførleika, um dystin og dystarleiðslu og virðisgrundarlag og Fair play.

Talan er ikki um próvtøku, men tað verður kravt, at uppmøtingin er eitt hundrað prosent.

# Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**Sunset-kappingin, FM-endaspælið**

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 21.01 | 15.00 | Stjørnan-Kyndil | Eyðun & Andreas |
| 22.01 | 14.30 | Neistin-VB | Karstin&Kristian |

**Sunset-kappingin, niðari bólkurin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.01 | 15.00 | Søljan-VÍF | Dánjal & Heri |
| 22.01 | 14.30 | StÍF-Tjaldur | Hallur & Petur |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22.01 | 16.00 | Neistin-VÍF | Karstin & Kristian |
| 22.01 | 16.00 | H71-KÍF | Kristian & Sámal |
| 22.01 | 16.00 | StÍF-Kyndil | Hallur & Petur |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.01 | 14.00 | SÍ-TB | Mjølnir |
| 21.01 | 15.00 | Dráttur-ÍF | Mjølnir |
| 22.01 | 14.00 | Mjølnir-KÍF | SÍ |
| 22.01 | 15.00 | TB-Dráttur | ÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22.01 | 15.00 | Fleyr-ÍF | SÍ |

# Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 11 | 11 | 0 | 33 | 9 | 24 | 12 |
| 2 SÍ | 11 | 8 | 3 | 27 | 18 | 9 | 9 |
| 3 ÍF | 11 | 6 | 5 | 24 | 20 | 4 | 6 |
| 4 TB | 11 | 5 | 6 | 21 | 18 | 3 | 6 |
| 5 Mjølnir | 11 | 2 | 9 | 12 | 30 | -18 | 2 |
| 6 KÍF | 11 | 1 | 10 | 9 | 31 | -22 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 9 | 8 | 1 | 25 | 10 | 15 | 9 |
| 2 SÍ | 9 | 7 | 2 | 24 | 10 | 14 | 8 |
| 3 Mjølnir | 8 | 4 | 4 | 17 | 13 | 4 | 4 |
| 4 ÍF | 8 | 3 | 5 | 14 | 17 | -3 | 3 |
| 5 Nøvan | 10 | 0 | 10 | 0 | 30 | -30 | 0 |

# Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

**FM-bólkurin**

| | d | v | j | t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 2 | 2 | 0 | 0 | 48 | 40 | 8 | 4 |
| 2 Stjørnan | 2 | 1 | 0 | 1 | 49 | 46 | 3 | 2 |
| 3 Neistin | 2 | 1 | 0 | 1 | 42 | 44 | -2 | 2 |
| 4 Kyndil | 2 | 0 | 0 | 2 | 35 | 44 | -9 | 0 |

**Niðari bólkurin**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 2 | 2 | 0 | 0 | 48 | 37 | 11 | 4 |
| 2 VÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 48 | 47 | 1 | 2 |
| 3 Søljan | 2 | 1 | 0 | 1 | 36 | 43 | -7 | 2 |
| 4 Tjaldur | 2 | 0 | 0 | 2 | 42 | 47 | -5 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 H71 | 2 | 1 | 0 | 1 | 332 | 278 | 54 | 10 |
| 2 Kyndil | 2 | 1 | 0 | 1 | 325 | 284 | 41 | 10 |
| 3 VÍF | 2 | 2 | 0 | 0 | 324 | 316 | 8 | 10 |
| 4 StÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 301 | 306 | -5 | 8 |
| 5 KÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 298 | 332 | -34 | 4 |
| 6 Neistin | 2 | 0 | 0 | 2 | 314 | 378 | -64 | 1 |